








# Í BR elska tey jólini



**Handilin er á tremur og BR-jólakalendarin á netinum er væl vitjaður, nú jólini eru í hondum og desember er byrjaður**

BR-jólakalendarin, ið finst á www.br.fo, er vælvitjaður, nú desember er byrjaður. Har eru nýggir vinningar hvøn dag.

Men eisini í handlinum merkja tey í BR, at jólini nærkast.

– Vit eru klár til jóla og handilin er á tremur. Sera nógv spøl eru at fáa til jóla í ár. Men annars fæst alt, frá leikum til tey smáu, og til mandlugávur, siga tey í BR.

## Upplivingar

BR hevur leikur til børn í øllum aldri. Men best dámar teimum at lýsa hetta við, at tey selja upplivingar. Í BR eru nógv stuttlig upplivilsi og hetta er sum ein ævintýrheimur hjá børnum.

– Tey droyma seg burtur, siga tey í BR, og tann sum hevur sæð børn sita og blaða í BR-blaðnum veit, at børnini kunnu sita longi og hyggja og droyma, tí óivað vita øll, at alt fáa tey ikki, men dreymarnar kunnu ikki takast frá teimum. Og glaðu eyguni í vitjandi børnunum ger, at í BR er stuttligt at starvast á jólum, eins og aðrar tíðir.

– Í BR merkjast jólini og Í BR elska vit jólini, siga tey í BR.

– Vit eru jólaklár, siga ey í BR.